## Ov nógv pappír

Sosialráðgevararnir í Danmark kæra seg um, at ymiskt pappírsarbeiði fer við alt ov stórum parti av dagligu arbeiðstíðini, og serliga illa stendur til hjá teimum, sum arbeiða í arbeiðsávísingini. Bettina Post, næstformaður í sosialráðgevarafelagnum, sigur við danska útvarpið, at tey brúka bara 18 prosent av arbeiðstíðini til at samskifta við viðskiftafólkini. Øll hin tíðin fer til pappírsarbeiði, og tað mugu politikararnir gera okkurt við, sigur hon.

## Egna fjølmiðlalóg

Tey seinastu árini hava grønlendingar brúkt eina grønlendska útgávu av donsku lógini um fjølmiðlaábyrgd, men nú hevur landsstýrið lagt fram uppskot um eina serliga grønlendska fjølmiðlaábyrgdarlóg. Tommy Marø, landsstýrismaður, sigur við útvarpið í Nuuk, at grønlendska samfelagið er sett saman av nógvum smáum lokalsamfeløgum, har øll kenna øll, og tí er neyðugt við einari lóg, sum er lagað til hesi viðurskiftini, sigur hann.

# Søguligur aðalfundur í Føroya Banka

**Aðalfundurin hjá Føroya Banka mánakvøldið var søguligur. Hetta var eftir ætlan seinasti aðalfundur við Fíggingargrunninum frá 1992 sum høvuðseigara bankans. Einskiljingin byrjar nú, og ætlandi skulu 66 prosent av bankanum seljast 2. ársfjórðing í ár.**

AÐALFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Hóast nakrir stólar stóðu tómir, vóru fleiri fólk á aðalfundi enn vanligt. Tilsamans vóru eini 50 fólk møtt á Hotel Føroyum mánakvøldið*

Vanliga er rættiliga lítil áhugi fyri aðalfundinum í Føroya Banka. Men mánakvøldið høvdu eini 50 fólk leita sær niðan á Hotel Føroyar at lurta eftir, hvat nevndarformaðurin, Jóhan Páll Joensen, hevði at siga um árið í fjør – og kanska serliga hvussu útlitini eru fyri árið í ár.

Privatu eigararnir eru einir 1200 í tali, men eiga kortini bert 0,6% av bankanum, hini 99,4 prosentini eigur Fíggingargrunnurin frá 1992. Men nú skal bankin einskiljast soleiðis, at privatir eigarar fara at eiga meirilutan.

Prospekt er gjørt at tillaga mannagongdir bankans til krøvini á virðisbrævamarknaðinum, eins og due-diligence frágreiðing er skrivað (due-diligence merkir gjøllig greining av eini fyritøku í sambandi við keyp ella sølu av viðkomandi fyritøku).

Landsstýrið samtykti í mai í fjør at bankin skal einskiljast í ár, og í hesum sambandi verður bankin skrásettur á Virðisbrævamarknað Føroya og Københavns Fondsbørs. Ætlanin er at selja 66 prosent av partabrøvunum, og henda søla skal farfa fram í 2. ársfjórðingi. Síðani skal restin seljast komandi árini.

Sagt verður í aðalfundarfrágreiðing bankans, at einskiljingin er komin væl áleiðis, og Fíggingargrunnurin valdi í fjør heyst Handilsbankan, Capital Markets, sum høvuðsráðgeva í sambandi við tilgongdina.

### Gott ár

Jóhan Páll Joensen, nevndarformaður, sigur í ársfrágreiðing nevndarinnar, at bankin er sera væl fyri, nú hann skal einskiljast. Avlopið í fjør var heilar 193 mió. kr., og hetta úrslit var betri enn í 2005, tá avlopið var 158 mió. kr.

Vøksturin í útlánunum var stórur, heili 33 prosent. Vøksturin er ein liður í ætlan bankans um at vaksa, og útlánini eru nú 5,4 mia. kr. ímóti 4,1 mia. árið fyri.

Inntøkurnar vuksu tó ikki samsvarandi, hetta tí at rentumarginalurin minkaði orsakað av øktari kapping – úr 4,2 niður í 3,9%. Tænastuinntøkurnar vusku haraftur ímóti við 15 mió. svarandi til 68%.

Bankin endurskipaði í fjør fleiri feløg, sum vórðu yvirtikin í sambandi við kreppuna í alivinnuni í 2003. Úrslitið av hesi endurskipan var størsta alisamtak í Føroyum, Bakkafrost Holding. Henda endurreising minkaði um kredittváðan hjá bankanum, sum harvið kundi afturføra burturleggingar upp á 66 mió. kr., og tað hevði góða ávirkan á ársúrslitið.

Føroya Banki vann sær í fjør ein størri marknaðarpart á útlánum, sum vaks úr 42 upp í 44% - altso ein slakur helmingur av samlaðu útlánunum í Føroyum. Hetta hevur tó ávirkað gjaldførið, og tí hevur verið neyðugt at fara út á altjóða lánimarknaðin at fíggja økta virksemið. Roknað verður við, at henda lántøka kemur undir land fyrsta dagin.

### Nýtt virksemi

Í 2006 fór bankin undir eina vakstrarætlan, sum miðar eftir at fjøltátta virksemi bankans. Saman við fleiri øðrum bankum hevur Føroya Banki gjørt íløgu í danska pensjónsfelagið Letpensjon. Endamálið við hesum er at veita kundum bankans kappingarfør pensjónstilboð á ein hátt, sum er lættur at skilja, sum sagt verður í ársfrágreiðingini.

Í fjør komu eisini nýggju tilboðini um lán, Fastlán og Rentuloft. Hesi eru langfreistað konventerbar fastrentulán, ið hava somu eginleikar sum realkredittlán. Hesi lán hava fingið góða undirtøku, kanska serliga tí rentustøðið er hækkandi.

Eisini á øðrum økjum hevur bankin vaksið um sítt virksemi. Eitt nú hevur bankin saman við P/F Krúnborg og P/F Tjaldur stovnað framtaksfelagið Løkir, hvørs endamál er at keypa fyritøkur við vakstrarmøguleikum.

Í fjør heyst stovnaði Føroya Banki eisini ognarmeklarafelagið Skyn, ið fæst við at selja hús, vinnubygningar og grundøkir. Somuleiðis fíggjaði bankin fyritøkum, ið gjørdu framtøk uttanlands, eitt nú P/F Vónin og P/F Thor. Somuleiðis fíggjar bankin helmingin av størstu nýíløgu í føroyskt fiskiskip nakrantíð, nevniliga Norðborg, ið verður bygd í Kili í løtuni.

So 2006 var samanlagt eitt sera virkið ár, sigur Jóhan Páll Joensen, nevndarformaður í ársfrágreiðing bankans.

# Útskifting í nevndini

AÐALFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Undan aðalfundinum í fjør valdu starvsfólk bankans tvey umboð í nevndina, og gjørdust hesi Sigmar Jacobsen, ið varð afturvaldur, og Olav Enomoto. Hann varð valdur í staðin fyri Jóhan Elkjær Hansen.

Í november í fjør broyttist nevndarsamansetingin, tá Rúni Hansen á eykaaðalfundi tók seg úr nevndini. Í hansara stað bleiv Graham D. Stewart, stjóri í Faroe Petroleum valdur.

Síðani hava Jóhannus Egholm Hansen og Høgni Hansen boðað frá, at teir tóku ikki við afturvali, og Fíggingargrunnurin gjørdi so av at velja Jens Erik Christensen og Eyðhild Skaalum í nevndina í staðin.

Nevndin sær sostatt soleiðis út: Jóhan Páll Joensen, Graham D. Stewart, Jens Erik Christensen og Eyðhild Skaalum vald av Fíggingargrunninum og Sigmar Jacobsen og Olav Enomoto, vald av starvsfólkum bankans.

### Royndar kreftir

Nýggju nevndarlimirnir hava drúgv ar royndir. Upplýst verður soleiðis um tey bæði á heimasíðu bankans:

Jens Erik Christensen er 56 ára gamal. Hann hevur drúgvar altjóða royndir úr fíggjarheiminum og innlit í at reka børsskrásettar fyritøkur. Jens Erik Christensen er fyrrverandi stjóri í Codan, Codan Forsikring og Trygg-Hansa Försäkrings AB. Hann situr í dag í mongum nevndum. M.a. er hann nevndarformaður í Scandinavian Private Equity og nevndarlimur í SAS og Falck.

Eyðhild Skaalum hevur løgfrøðiligar royndir bæði í Danmark og Føroyum. Hon hevur síðan 1998 verið nevndarlimur í Fíggingargrunninum frá 1992. Eyðhild Skaalum hevur løgfrøðiligt kandidatprógv av lærda háskúlanum í Keypmannahavn, fór at virka sum advokatur í 1993 og hevur seinastu 11 árini rikið sjálvstøðugt advokatvirki.

Formaður í nevndini í Føroya Banka hevur seinastu árini verið Jóhan Páll Joensen, og hann er vælnøgdur við uppskotini til nýggjar nevndarlimir.

- Hesi uppskotini til aðalfundin eru sera vælkomin. Talan verður um eina sterka og dugnaliga nevnd í Føroya Banka, sum skapar gott grundarlag fyri eini væl eydnaðari einskiljing og skráseting á virðisbrævamarknaðunum og víðarimenning av bankanum til gleði fyri starvsfólk, kundar og alt tað føroyska samfelagið. Eg takki samstundis fráfarandi nevndarlimunum fyri gott samstarv í nevndini, sigur Jóhan Páll Joensen.

Nýggja nevndin hevur ikki skipað seg enn.